Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøta

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.

Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn

Telefon (298) 31 11 45
Telefax (298) 31 15 25
Heimasíða www.jura.fo

Innlendismálaráðið
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

Tórshavn 10.03.2006.
J. nr. 20060239
Skrivari: Birna Joensen
bij@jura.fo

**Viðv. broyting av lóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir – tykkara mál nr. 1600-069/05-2**

Eg vísi til fundin í Innlendismálaráðnum tann 8. mars 2006, har umboð fyri P/f Føroya Bjór fingu høvi til at greiða frá teirra sjónarmiðum í sambandi við omanfyrinevndu tilætlaðu lógarbroyting.

Á fundinum varð eisini víst til fund, sum hevði verið við Innlendismálaráðið tann 14. des. 2005 um sama spurning, men tá var fundurin orsakað av brævi frá Innlendismálaráðnum til Føroyar Bjór, dagfest 23. nov. 2005, har víst var til fyrispurningar til landsstýrismannin í umhvørvismálum um loyvi til at innflyta eitt nú mineralvatn og aðrar leskidrykkir í eingangsíløtum.

Fundurin tann 8. mars 2006 snúði seg um bræv, ið Innlendismálaráðið hevði fingið frá uttanríkisdeildini hjá Løgmansskrivstovuni, dagfest 27. febr. 2006, har ført varð fram, at uttanríkisdeildin eftir samskifti við íslendska uttanríkismálaráðið var komin til ta niðurstøðu, at forboðið móti at flyta inn og selja drykkivørur í eingangsíløtum er at meta sum tøknilig handilsforðing, ið ger mismun á føroyskari og íslendskari vøru og at lógin tískil ikki er í samsvar við Hoyvíkssáttmálan.

Á fundinum greiddu vit frá okkara sjónarmiðum um hendan spurningin og vóru umrøðuevnini hesi:

1. Er løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir í stríð við Hoyvíkssáttmálan?
2. Føroyska lógin sum umhvørvisverndarlóg.
3. Eru reglurnar í lógini sambærligar við sáttmálan, sæddan í EBS-høpi?
4. Nærri um EBS- rætt og umhvørvisvernd.
5. Atgeingi hjá føroyskum bryggjaríum til íslendska marknaðin.
6. Fylgjurnar av einari lógarbroyting.

*Viðv. 1: Er løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir í stríð við Hoyvíkssáttmálan?*

Sum grundgeving fyri niðurstøðu sínari vísir uttanríkisdeildin til grein 5.1.C í Hoyvíkssáttmálanum, samanborið við grein 5.2A, har ásett er bann fyri at gera nakran mismun vegna upprunastað millum

vørur, sum hava uppruna sín innan umveldisvídd sáttmálans. Hetta bann er galdandi fyri allar vørur, løgliga marknaðarførdar innan umveldi sáttmálans, við tí fyrivarni at tær lúka tilskilað krøv um alment siðsemi og trygd.

Sum framført á fundinum í Innlendismálaráðnum, er tað okkara sjónarmið, at omanfyrinevnda lóg um íløt til øl v.m. ikki ger mismun millum íslendskar og føroyskar vørur vegna upprunastað.

Í § 2 í lógini er ásett, at tað er ikki loyvt at flyta inn ella selja øl og mineralvatn v.m. í eingangsíløtum. Tað verður sostatt ikki gjørdt mismunur millum vørur, ið verða framleiddar í øðrum landi, ið fevnt er av Hoyvíkssáttmálanum, og vørur sum framleiddar eru í Føroyum. Íslendsk bryggjarí og útflytarir hava sostatt sama atgeingi til føroyska marknaðin við nevndu vørum sum framleiðarar, ið hava heimstað í Føroyum, og er tí ikki talan um mismun vegna tær í nevndu sáttmálagreinum umrøddu grundum.

*Viðv. 2: Føroyska lógin sum umhvørvisverndarlóg.*

Løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 er ein rein umhvørvisverndarlóg, ið hevur drúgva forsøgu í føroyskari lóggávu. Við at hyggja at ígildiskomugreinini í hesi lóg (§ 7) og samanbera við ígildiskomugreinir í lógum, ið hava verið galdandi frammanundan sæst, at lógin í roynd og veru er ein nágreining av § 1 í løgtingslóg nr. 48 frá 9.juli 1970 um náttúrufriðing.

a: Í § 1, stk. 2 í náttúrufriðingarlógini frá 1970 er ásett, at "øll dálking av náttúruni við pappíri, fløskum, plastikíløtum, brotum o.ø. er forboðin."

b: Næsta lógin á økinum er løgtingslóg nr. 32 frá 1. juni 1972 um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni og øðrum evnum í "stubby" fløskum. Í viðmerkingunum til nevnda lógaruppskot verður sagt av landstýrinum, at burturkastingin av "stubby" fløskum dálkar nú í náttúruni í eitt slíkt mát, at neyðugt er at forboðsregla fyri innflutningi av "stubby" fløskum verður sett í gildi, av tí at "stubby" fløskurnar ikki verða tiknar aftur av bryggjaríunum og tá reglan í § 1 í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juni 1970 ikki verður hildin so væl sum ynskiligt, má eitt sterkari tiltak til.

c: Sambært løgtingslóg nr. 45 frá 24. mai 1974 verður ein broyting gjørd í omanfyrinevndu lóg og er § 1 í hesi lóg soljóðandi: "Loyvt er ikki at flyta inn ella selja øl og mineralvatn í einbrúksíløtum."

Í viðmerkingunum verður sum grundgeving fyri hesari lógarbroyting ført fram, at tá lógin frá 1972 í síni orðing ikki umfatar t.d. dunkar av metalli ella øðrum evni, er tørvur fyri at innflutningurin og sølan av øli og mineralvatni í einbrúksfløskum verður bannað.

d: Løgtingslóg nr. 79 frá 27. juli 1989 um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni og øðrum lidnum leskidrykkum í dósum og eingangsfløskum ásetur í § 1, at "loyvt er ikki at flyta inn ella selja øl, mineralvatn ella aðrar leskidrykkir í dósum og eingangsfløskum."

Í viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið verður ført fram, at grundin er at tað eru nógv ynskir komin um hesa broyting seinastu árini orsakað av stórari nøgd av juice, kakao og øðrum drykkum í dósum, sum innflutt verða til Føroya. Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at lógin er ein umhvørvislóg ímóti emballaguni og eigur lógin tí eisini at fevna um leskidrykkir í somu íløtunum, sum øl og mineralvatn eru í.

e: Í galdandi lóg, løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994, er í § 1 ásett, at lógin fevnir um íløt til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir.

§ 2 ásetur, at ikki er loyvt at flyta inn ella selja tær í § 1 nevndu drekkavørur í eingangsíløtum, t.e. íløt sum bert einaferð verða nýtt til upprunaliga endamálið.

Í § 4 er ásett, at Toll- og Skattstova Føroya kann krevja, at framleiðarar/innflytarar av teimum í § 1 nevndu drekkavørum, skulu prógva, at innsavningar- og returskipan er til staðar sum tryggjar, at íløtini verða send aftur til endurfylling.

Endaliga er í § 5 ásett, at landstýrið kann seta í verk reglur fyri pantiskipanum fyri íløt til tær í § 1 nevndu drekkavørur og kann áseta støddina á pantinum.

Her skal viðmerkjast, at sum kunnugt er ein frívillig pantiskipan galdandi fyri returfløskur og hevur hendan skipan virkað væl.

Í viðmerkingunum til galdandi lóg sigur landstýrið millum annað, at tættari handilssamband við fleiri grannalond og broytingar í marknaðarføring av serliga mineralvatni og leskidrykkjum gera, at vit av umhvørvisorsøkum eiga at endurnýggja lógina fyri íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir. Víðari verður ført fram í viðmerkingunum, at andin í lógini samsvarar væl við støðugt harðnandi rákið í altjóða umhvørvispolitikki, nevniliga at tað er framleiðarin (og innflytarin hansara vegna) sum skal reika so fyri, at framleiðarin fær emballaguna aftur. Somuleiðis verður sagt í viðmerkingunum, at heilsølur, smásølur og framleiðarir av mineralvatni og lidnum leskidrykkum, hava eisini gjørt landstýrið vart við, at tey ynskja at halda fast við endurnýtsluíløt og at somu reglur eiga at vera galdandi fyri føroyska framleiðslu, sum fyri innflutning.

Somuleiðis verður sagt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at Føroya landstýrið roknar ikki við at hendan skipanin kemur at vera orsøk til ákærur um kappingaravlagandi tiltøk frá eitt nú ES.

Sum tað sæst av frammanfyristandandi, er galdandi lógin seinasti varðin á einari 35 ára lóggávu í Føroyum um náttúruvernd, og er ein rein náttúruverndarlóg.

Hetta reisir tann spurning, ið skal vera viðgjørdur niðanfyri undir pkt. 3, um reglurnar í lógini eru sambærligar við Hoyvíkssáttmálan, sæddan við EBS-brillum.

*Viðv. 3: Eru reglurnar í lógini sambærligar við sáttmálan, sætt í EBS-høpi?*

Um hendan spurning vísir uttanlandsdeildin í brævi sínum til, at Ísland og Føroyar undir samráðingartilgongdini viðvíkjandi Hoyvíkssáttmálanum hava nýtt ES- og EBS-rætt sum keldu í sambandi við tulking av ymiskum hugtøkum, sum eru at finna í sáttmálanum. Víðari verður sagt í brævinum, at upprunin til ásetingina í grein 5, 2A..iv er sokallaða Cassis-de-Dijon-aðalreglan í ES-lóggávu, sum hevur til endamáls at byrgja fyri, at ymsar fyriskipanir hava við sær handilsforðingar, sum stríða móti endamálinum við Hoyvíkssáttmálanum um víðfevnt frælsi viðvíkjandi vøruhandli millum Føroyar og Ísland.

Hertil er fyrst at siga, at tað sæst ikki av sjálvum Hoyvíkssáttmálanum ella teimum frumskjølum, ið víst verður til í sáttmálanum, at ES- ella EBS-lóggáva skal vera galdandi í høpi Hoyvíkssáttmálans. Havandi í huga, at Føroyar hvørki eru bundnar at ES- ella EBS-rætti, kunnu hesar rættarskipanir tí allarhægst vera mettar at vera tulkingaríkøst til sáttmálan, eins og mong onnur tulkingaríkøst, ið mugu metast at vera viðkomandi.

Tað kann sostatt neyvan vera góðtikið, at ES- ella EBS-rættur skulu hava nakra autoriativa tulkingarstøðu omanfyri aðrar vanligar tulkingarreglur, tá ræður um altjóða sáttmálar.

Verður Hoyvíkssáttmálin hinvegin lisin við atliti at ES/EBS rætti, sum uttanríkisdeildin leggur upp til, er eyðsæð at ES við ávísum treytum góðkennir lóggávu og aðrar reglur, ið hava til endamáls at verja umhvørvið í ávísum limalandi, kunnu avmarka tað annars grundleggjandi hugtakið í ES um frían vøruflutning ES-limalandanna millum.

Hesin spurningur skal vera nærri umrøddur niðanfyri undir pkt. 4.

*Viðv. 4: Nærri um EBS- rætt og umhvørvisvernd.*

Uttanríkisdeildin vísir á "sokallaðu Cassis-de-Dijon-aðalregluna í ES-lóggávu", sum skal hava til endamáls at byrgja fyri, at ymsar fyriskipanir hava við sær handilsforðingar, sum stríða ímóti endamálinum við Hoyvíkssáttmálanum.

Hertil er at viðmerkja, at tað í roynd og veru ikki snýr seg um nakra "aðalreglu í ES-lóggávu", men um ein dóm, ið sagdur varð av ES-dómstólinum tann 20. febr. 1979 (mál nr. 120/78) í einum trætumáli millum eina franska likørverksmiðju og týska monopolskipanina fyri brennivín. Í Týsklandi var ein regla galdandi um, at fruktlikørar, so sum " Cassis-de-Dijon" ikki kundu seljast í Týsklandi, uttan at teir høvdu eitt minsta innihald av alkoholi uppá 25 %. Dómstólurin kom til ta niðurstøðu, at eitt tílíkt krav, ið ikki kundi grundast á verju av almannaheilsu ella brúkaraverju, var í stríð við ES-reglur um frían vøruflutning limalandanna millum. Dómstólurin segði samstundis, at forðingar fyri fríum vøruflutningi landanna millum kundu góðkennast, um so var at tílíkar reglur kundu verða góðkendar sum neyðugar til verju av omanfyrinevndu endamálum, hvat dómstólurin kortini ikki metti var galdandi, tá tað snúði seg um hetta likørslagið.

Í einum rundskrivi frá ES-kommisiónini til limalondini, dagfest 3. okt. 1980, verður greitt frá dóminum, og í hesum rundskrivi tulkar kommisiónin dómin og hvørji undantøk frá fríum vøruflutningi kundu verða góðkend. Um hetta sigur kommisiónin í nevnda rundskrivi soleiðis:

> *"Only under very strict conditions does the Court accept exceptions to this principle; barriers to trade resulting from differences between commercial and technical rules are only admissible:*
>
> *If the rules við necessary, that is appropriate and not excessive, in order to satisfy mandatory requirements (public healt, protection of consumers or the environment, the fairness of commercial transactions, etc.);*
> *…"*

Sum tað sæst á omanfyristandandi, góðkennir kommisiónin millum annað verju av umhvørvinum, sum í givnum føri kann verða góðkent sum avmarking í fríum vøruflutningi.

Ein annar dómur frá ES-dómstólinum, ið hevur beinleiðis týdning fyri sambærligheitina av løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 við Hoyvíkssáttmálan, er ein dómur, ið sagdur varð tann 20. sept. 1988 (mál nr. 302/86) í einum sakarmáli millum ES-kommisiónina og Danmark.

Dómurin snúði seg um ta donsku pant- og returskipanina fyri innpakking og viðurkendi ES-dómstólurin, at verja av umhvørvinum er eitt av grundleggjandi endamálunum hjá felagsskapinum. Víðari sigur dómurin í dómsgrundunum, at ein panti- og returskipan fyri tóm íløt má haldast at vera neyðug fyri at náa teimum málum, sum danska stjórnin hevði sett sær viðvíkjandi umhvørvisverju, og at tær avmarkingar í fríum vøruflutningi, sum gjørdist ein fylgja av tílíkum reglum, ikki vóru ov víttgangandi.

Víðari sigur dómstólurin í grundgevingum sínum, at umhvørvisverja er eitt tvingandi atlit sum kann avmarka reglurnar í grein 30 í ES-traktatini um frían vøruflutning.

Við hesum grundgevingum varð danska panti- og returskipanin góðkend av ES-dómstólinum, hóast hon í ávísan mun kundi føra við sær avmarkingar í frælsum vøruflutningi limalandanna millum.

Dómstólurin góðkendi hinvegin ikki, at Danmark við einari nýggjari kunngerð frá 16. mars 1984 hevði avmarkað nøgdina av øli og øðrum drykkum, ið kundu marknaðarførast í ikki-góðkendum íløtum.

Av øðrum dómum frá ES-dómstólinum, ið góðkenna reglur um umhvørvisverju sum grundleggjandi ES-atlit, sum í ávísan mun kann avmarka fríum vøruflutningi limalandanna millum, kunnu vera nevndir dómurin frá 7. febr. 1985 (mál nr. 240/83) um reglur um burturbeining av spillolju og dómur frá 14. juli 1998 (mál nr. 389/1996) um gang frá flogførum.

Samanumtikið má tí sigast, at umhvørvisverja er eitt grundleggjandi atlit, ið verður góðkent av ES-rættinum, hóast tjóðskaparligar reglur um umhvørvisverju í ávísan mun kunnu sigast at avmarka fría vøruflutningin.

Sama má tí eisini sigast um tulking av Hoyvíkssáttmálanum við ES- og EBS-rætti sum tulkingaríkasti.

*Viðv. 5: Atgeingi hjá føroyskum bryggjaríum til íslendska marknaðin.*

Sum tað sæst av brævinum frá uttanríkisdeildini til Innlendismálaráðið, dagfest 27. febr. 2006, hevur uttanríkisdeildin verið í samskifti við íslendska uttanríkismálaráðið um føroysku umhvørvislógina, og er uttanríkisdeildin samd við íslendska uttanríkisráðið um, at lógin er at meta sum tøknilig handilsforðing.

Tað sæst hinvegin einki í brævinum um, at uttanríkisdeildin hevur kannað íslendsku lóggávuna og reglurnar á økinum og verður tí neyðugt at lýsa íslendsku skipanina gjøllari.

Í hesum sambandi er fyrst at viðmerkja, at meðan bryggjaríini í Føroyum hava loyvi til at hava sínar egnu útsølur, er tílíkt ikki loyvt í Íslandi, har øll søla, eisini av íslendskt bryggjaðum øli, skal fara fram gjøgnum íslendska brennivínsmonopolið (ÁTVR). Her verður sostatt longu ein mismunur millum íslendsku og føroysku bryggjaríini, soleiðis at skilja, at eftir at Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi, kunnu íslendsk bryggjarí seta egnar útsølur upp í Føroyum, meðan tílíkt ikki er loyvt fyri føroysk bryggjarí í Íslandi.

Íslendska monopolskipanin er annars gjøllari lýst í viðheftu skjølunum, ið eru útvegað frá íslendsku myndugleikunum. Vøruúrvalið í íslendsku einkarsøluni er býtt upp í fýra flokkar: ein royndarflokk, eina kjarnu, ein mánaðarflokk og ein serflokk.

Í okkara sambandi er tað serliga royndarflokkurin og kjarnan, ið hava áhuga.

Í royndarflokkinum eru tilsamans 1400 vørusløg, sum øll verða seld í størstu útsølunum hjá einkarsøluni, nevniliga Heiðrún og Kringluni. Um eitt føroyskt bryggjarí ynskir at selja vørur sínar í Íslandi, má tað søkja um góðkenning frá íslendsku myndugleikunum og søkja um at verða tikin upp í royndarflokkin. Um øll 1400 vørusløgini í royndarflokkinum eru upptikin, má bíðast til ein vøra gongur út. Síðani skal føroyska ølið eftir 12 mánaðium vera komið upp á 75 % av bruttosøluni av tí seinasta vøruslagnum, ið varð góðkent í royndarflokkinum, ella upp á 75 % av bruttosøluni av

miðalsøluni hjá 600 vørumerkjum í royndarflokkinum. Lýkur ølið aðra av hesum treytum, verður tað tikið upp í kjarnuflokkin.

Hinvegin verður ein vøra strikað úr royndarflokkinum, um hon ikki í 12 mánaðir er komin upp á eina sølu, svarandi til í minsta lagi 35 % av bruttosøluni av tí minst selda av hinum vørumerkinum, ella 35 % av miðalbruttosøluni hjá 600 vørusløgum á listanum.

Er ein vøra strikað úr royndarflokkinum, kann hon ikki koma innaftur, fyrr enn 12 mánaðir eru farnir.

Í kjarnuflokkinum eru 600 vørusløg, harav 85 sløg av øli. Tað eru eisini ávísar reglur um, nær ein vøra verður strikað úr kjarnuflokkinum, ið er reiðiliga ringar at skilja.

Somuleiðis eru nýggjar reglur um, hvussu nógv vørusløg í minsta lagi skulu vera á søluskránni hjá teimum ymisku útsølunum, ið ÁTVR hevur runt um landið. Hesar reglur gera tað eisini torført hjá einum føroyskum ølslagi av gera seg galdandi á íslendska marknaðinum.

Harumframt eru reglur um, at ÁTVR kann sýta fyri at selja eina vøru, ið tekur størri hyllapláss enn vanligt orsakað av innpakkingini. Somuleiðis kunnu teir nokta fyri at selja vørur í ymisku útsølunum kring landið, ið taka meira hyllapláss, enn pláss er til í viðkomandi útsølu.

Allar hesar avmarkandi reglur hjá ÁTVR, ið ikki hava sín líka í føroysku einkarsøluskipanini, og sum í stóran mun munnu vera ivasamar, sæð við EBS-eygum, mugu í stóran mun metast at vera beinleiðis handilsforðingar mótvegis t.d. føroyskum øli á íslendska marknaðinum, samanborið við møguleikarnar hjá einum íslendskum øli at koma á føroyska marknaðin.

Tað má haldast at vera sjálvsagt, at føroyskir myndugleikar tryggja sær, at hesar handilsforðingar verða avtiknar sum treyt fyri einari møguligari broyting av føroysku lóggávuni.

*Viðv. 6: Fylgjurnar av einari lógarbroyting.*

Sum frammanfyri nevnt, fekk Danmark viðhald í dóminum, ið sagdur varð av ES-dómstólinum tann 20. sept. 1988, um at teirra returskipan fyri ølfløskur v.m., ikki var í stríð við grein 30 í ES-traktatini.

Í 1999 stevndi ES-kommisióni Danmark av nýggjum og hesu ferð snúði málið seg um danska forboðið fyri eingangsdósum. Málið kom ongantíð til dóms, av tí at Danmark boygdi seg fyri uppskotinum hjá ES-generaladvokatinum til avgerð í málinum, sum hevði gingið Danmark ímóti. Eftir hetta varð nýggj lóg sett í gildi í Danmark (lógarkunngerð nr. 713 frá 24. aug. 2002) um ein panti- og innsavningarskipan. At standa fyri hesari skipan varð stovnað partafelagið Dansk Retursystem A/S.

Lógin áleggur øllum, ið selja øl ella aðrar drykkivørur, at krevja pant fyri íløtini. Allir útbjóðarir av tílíkum vørum hava skyldu til at boða frá til Dansk Retursystem A/S, sum stendur fyri innsavningini og umsitur pantiskipanina. Hetta er ein ógvuliga umfatandi skipan, ið áleggur øllum, ið handla við tílíkum vørum at taka ímóti tómu íløtunum og rinda pant.

Skal ein líknandi skipan setast í gildi fyri Føroyar, skulu allir innflytarir av tílíkum vørum rinda pant fyri hvørt einasta blikk ella eingangsfløsku, sum kemur inn í landið. Í løtuni er galdandi pantiskipan fyri øl og sodavatnsfløskur tann, at pant verður goldið við kr. 1,50 pr. ílat. Neyðugt verður eisini hjá øllum, ið handla við tílíkum vørum, at seta fólk at taka sær av hesum ella útvega automatir at gera

arbeiðið. Tann tóma emballagan, ið verður flýggjað handlunum, skal síðani sendast aftur til innflytararnar og síðani sendast av landinum aftur ella til IRF ella KB.

Hetta verður ein dýr og arbeiðskrevjandi skipan, ið neyvan stendur í mun til fyrimunin av at lata marknaðin upp fyri eingangsdósum.

P/F Føroya Bjór metir, at skulu teir lúka krøvini til eina tílíka skipan, skulu teir í minsta lagi gera eina íløgu til nýggja tappikolonnu til blikkdósir fyri einar 7-8 mió. kr. og harumframt einar 3 mió. kr. í eina blásimaskinu til PET-fløskur (plastfløskur sum kunnu vaskast). Ein tílik maskina virkar á tann hátt, at eingangsfløskur og plastikfløskur, sum verða innfluttar samanlagdar, verða blástar út til ta støddina, ið hvør einkult øl ella sodavatnslag tørvar.

*Samanumtikið*
Á fundinum við Innlendismálaráðharran tann 8. mars 2006 skiltu vit, at Innlendismálaráðið fór at leggja stóran dent á, at ein møgulig lógarbroyting ikki fór at hava negativa ávirkan á umhvørvið, samanborið við galdandi skipan, sum má haldast at hava virkað sera væl. Tað fer at vera dýrt og krevja stóra umsiting, um ein nýggj skipan skal lúka somu umhvørvistreytir, sum verandi lóg.

Samanumtikið kann neyvan haldast, at fyrimunirnir við at geva loyvi til frían innflutning av dósum og eingangsíløtum, fer at viga upp ímóti umsitingar- og kostnaðartørvi til eina nýggja innsavningarskipan, ið minnir um ta í Danmark galdandi.

Tá galdandi føroyska skipanin á økinum ikki kann haldast at vera í stríð við Hoyvíkssáttmálan og somuleiðis má metast at vera sambærlig við ES-skipanina, verður heitt á Innlendismálaráðið um at varðveita galdandi skipan, ella í øllum førum ikki at innføra eina nýggja skipan, fyrr enn fylgjurnar av einari tílíkari skipan eru gjølla kannaðar.

Avrit av hesum brævi er sent til Løgmansskrivstovuna, uttanríkisdeildina, og løgtingsins uttanlandsnevnd.

Vinarlig heilsan

Halgir Winther Poulsen, adv.
hwp@jura.fo